VIÐMERKINGAR

Tíðindaskriv frá Javnaðar- og Sambandsflokkinum:

Skattalætti

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava lagt uppskot fyri tingið um skattalætta. Uppskotið er fyrsti partur av fleiri skattalógaruppskotum, sum eftir ætlan skulu koma í gildi á nýggjárinum. Hini uppskotini, sum koma seinni, hava til endamáls at hækka serliga pensiónistafrádráttin í skattalógini og at lække serliga avgjaldið á brenniolju.

Skattastigin fyri lág, og miðalinntøkur skal broytast, og barnafrádrátturin í landsskattinum verður hækkaður úr 4.000 upp í 6.000 krónur. Hetta eru høvuðsbroytingarnar í nýggja skattalógaruppskotinu, sum Javnaðarflokkurin og Sambandflokkurin leggja fyri tingið.

Í krónum merkir hetta, at føroyingar skulu gjalda umleið 84 mió. krónur minni í skatti. Av hesum eru 26 mió krónur hækkaður barnafrádráttur, meðan 58 mió krónur eru beinleiðis skattalætti.

Í gildi á nýggjárinum

Fólkaflokkurin boðaði frá í september, at hann fór at koma við einum uppskoti um skattalætta fyri tey næstu 10 árini. Hetta uppskotið skuldi fáa gildi frá fyrst komandi ári. Men nú, tveir mánaðir seinni, er framvegis einki uppskot komið. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava tí avgjørt at leggja eitt líknandi uppskot, sum tað hjá Fólkaflokkinum fyri tingið nú, so tað kann koma í gildi á nýggjárinum.

Samanborið við uppskotið hjá Fólkaflokkinum gevur andstøðuuppskotið meira skattalætta, enn uppskot Fólkafloksins. Tó hevur andstøðan val, ikki at lóggeva fyri eitt heilt tíggju-áraskeið undir einum, men heldur at taka eitt ár í senn.

Lógartekniskt er uppskotið hjá andstøðuflokkunum sera einfalt, og tí halda folokkarnir tað ikki vera neyðugt við eini langtíðarætlan, ið einans byggir á metingar.

Fleiri uppskot koma seinni í ár

Í næstum fara Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin at leggja fleiri onnur uppskot fram, sum hava til endamáls at lætta um hjá teimum, sum ringast eru fyri. Talan er um at hækka serliga pensiónistafrádráttin í skattalógini, og at lækka serliga avgjaldið á brenniolju.

Tíðindaskriv

Virkisætlan um KT-nýtslu í skúlunum

Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum, Tórbjørn Jacobsen, hevur sett eina nevnd, sum skal gera tilmæli til eina virkisætlan um KT-nýtslum á vinnu-, miðnáms- og hægri skúlunum.

Í mars 1998 handaði ein arbeiðsbólkur landsstýrismanninum tilmæli um KT í fólkaskúlanum, sum nú er sett í verk við m.ø. KT-deplinum. Nevndin, sum nú er sett, skal, sum eitt framhald av arbeiðinum hjá KT-nevndini í fólkaskúlanum, koma við tilmæli um, hvussu útbreiðslan av KT-nýtsluni, ikki minst í námsfrøðiligum høpi, kann økjast munandi meira á vinnu, miðnáms- og hægri skúlunum.

Í KT-nevndini fyri vinnu, miðnáms- og hægri skúlar eru umboð fyri skúlarnar og KT-depilin. KT-nevndin er biðin um at handa landsstýrismanninum álit í seinasta lagi 1. mars 2001.

Í nevndini eru: Petur Zachariassen, Fróðskaparsetur Føroya, formaður, Naina Jaocbsen, Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy, Linjon Jacobsen, Tekniski skúlin í Klaksvík, Doris Djurhuus, Handilsskúlin á Kambsdali, Regin Ellingsgaard, KT-depilin, Heri Kragesten, Føroya Læraraskúli, Marianna Norðoy, Sjúkrasystraskúli Føroya, Hans Andrias Dam Joensen, Undirvísingar- og Mentamálastýrið, er knýttur at nevndini sum skrivari.

Betri fíggjarstýring



Karl Heri Joensen
býráðslimur

Í dag – dag Sameindu Tjóða – eru 4 vikur til kommunuval verður, og valevnini gera nógv burturúr, bæði við skriving í bløðunum og á alnótini. Hetta er eisini galdandi fyri nógv av teimum, ið eru uppstillaði til býráðsvalið í Klaksvík. Fleiri av valevnunum koma við háfloygdum tonkum og gyltum lyftum, samstundis sum eftirmetingar verða gjørdar av farna valskeiði.

Fólkafloksleiðsla

Fólkaflokkurin hevur seinastu 20 árini sitið við leiðsluni, undantikin er setan frá 1989 til 1993. Fráboðanin hjá flokkinum nú uppundir valið er, at teir stevna beinleiðis eftir formanssessinum til komandi setu.

Felags fyri tey bæði 8 ára tíðarskeiðini, Fólkaflokkurin hevur havt leiðsluna er, at bæði hava verið búskaparligar uppgangstíðir sum sjálvdan áður. Felags hevur eisini verið, at hóast inntøkan so at siga hvørt einasta ár setur met, og er størri enn tað roknað hevur verið við, so hevur kommunan ongan tøkan pening.

Gylt lyftir

Tað hevur áður eydnast Fólkaflokkinum við gyltum lyftum til borgarnar at fingið stóra undirtøku til valini. Dømi eru: Útstykkingar, vegagerðir, góðshavn, útbygging av Ósaskúlanum, mentanarhús, heilsumiðstøð, høvuðsumvæling av svimjihøllini o. a. Fleiri ferðir hava vít hoyrt í fjølmiðlunum, at nú verður farið undir hetta arbeiði ella hitt, men onki verunligt hevur komið burturúr. Treyðugt so, – uppundir val eru altíð nakrar rembingar.

Nógvir borgarar undrast á, at tað sást so lítið til ta met stóru inntøku kommunan hevur havt seinastu árini. Tað tykist ikki vera samsvar millum stabbamyndirnar í Norðlýsinum, og tað sum sást, at borgarin fær fyri pengarnar. Hvat kann so verða orsøkin.

Stríðast við 80-ini

Vit stríðast framvegis við lántøkuna frá 80-unum. Í 1989 hevði kommunan eina skuld uppá 227 mill. kr., ov við árslok 120 mill. kr. Hesi seinastu 12 árini hevur komman, – og tað er skattaborgarin, – goldið kr. 250 mill. kr. bara í rentum, – jú tygum lósu rætt, – og tað skulu nógvar 10'tals miljónir gjaldast í rentuútreiðslum afturat, áður enn skuldin er burtur. Lántøkan í 80-unum kemur, áðrenn hon er niðurgoldin, at trykkja skattaborgaran í minsta lagi eini 20 ár. Hugsi tykkum hvat vit kundu útbygt býin fyri upp gjøgnum 90-ini fyri hesar yvir 350 mill. kr., ið er goldið í rentum og avdráttum.

Ein stórur partur av tí, sum borgarin hevur rindað í skatti, er farin til lánsgjøld. Okkurt árið eru uml. 45% av kommunuinntøkuni farin til lánsgjøld, og seinastu árini er parturin uml. 30% av inntøkuni. Tað hevur tí verið sera trupult at fylgt við tíðini í nútímansgerð av býnum, og eru vit tí í dag eftirbátar á nógvum økjum.

Met høgur rakstur

Fólkafloksleiðslan í býráðnum hevur áður ikki verið smæðin, at átala ta bólnandi almenna virksemi á landspolitiskum plani, men rokniskapartølini vísa at onki mætari er í Klaksvíkar kommunu.

Nevnast kann, at raksturin á fíggjarætlanini ár 2000 og ár 2001 hækkar frá 36 mill. kr. til 46 mill. kr., ið er ein vøkstur uppá 28%. Tá er ikki settur peningur av til óvæntaðar útreiðslur, og onki avlop er á fíggjarætlanini.

Betri fíggjarstøring

Fleiri ferðir havi eg, á býráðsfundum, víst á, at neyðugt er við betri fíggjarstýring, og at neyðugt er at kommunan hevur ein ávísan likviditet, men tað tykist ikki sum at leiðslan skilur hvønn týdning hetta hevur.

Vit eru nú komin inn í eitt nýtt ártúsund, og er tað mín vón, at hetta eisini skal vera byrjanin til eitt tíðarskeið hjá Klaksvíkar kommunu har tað verður samsvar millum fíggjarorku og útreiðslur. Sum politikari hevur tú skyldu til at veita borgarunum mest møguliga úrtøku fyri hvørja goldna skattakrónu.

Sjálvstýrisflokkurin fer framhaldandi at taka undir við góðum verkætlanum, men síggjast má í eyguni, at alneyðugt er við prioriteringum frá politiskari síðu, um borgarin skal fáa sum mest burturúr hvørjari skattakrónu.

Her eigur at vera rúm fyri okkum øllum



Jan Gardar
valevni Sjálvstýrisfloksins

Sum eg havi nevnt í arðari grein í blaðnum í dag, er alneyðugt at vit taka avbjóðingarnar í samband við undirsjóartunnilin í stórsta álvara. Vit skulu ikki óttast framtíðina men heldur ikki vænta at alt lagar seg av sær sjálvum.

Á tí mentunarliga og sosialmentunarliga økinum eru vit ikki og væl brynjaði. Soleiðis er tað, sum skuldi verða mentunarháborg okkara Atlantis, koyrt fallit. Tað má sigast at verða meira syrgiligt enn skomm at Klaksvíkin í ár 2000 ikki megnar at reka eitt lítið hús sum Atlantis. Her eigur býráði í størri mun at verða við til at styðja og stuðla uppundir, soleiðis at húsið aftur fær innihald og møguleika at virka við sjónleiki, biografi og mentunarligum átøkum annars.

Her kundi verið rímuligt at nevnt fleiri onnur ið eisini eiga betur umstøður uppiborið, eitt nú málningalistin, tónleikurin og onnur við. Eitt sum eisini skal tryggjast er at møguligur stuðul, ikki bert fellur teimun í lut, sum tann til einhvørja tíð sitandi býráðsmeiriluti dámar.

Í Klaksvík eru tvær matstovur við skeinkiloyvið og eitt alment dansistað uttan skeinkiloyvið og eru vit í dag stórliga eftirbátar á hesum økinum. Ikki sigi eg at vit skulu hava 15-20 ella óavmarka tal av skeinkiloyvum, men tað er ein sannroynd at ungfólk í hópatalið hvørt vikuskifti leitar sær til Havnar av hesi orsøk. Var tað ikki tá betur at tey vóru her á staðnum? Ella er tað í lagið bert vit ikki síggja tað? Alternativi er at setað aldursmark til Dúgvuna og at lata verða við at bora undirsjóartunnilin.

Her eigur býráði at stinga út í korti nýggjar leiðir soleiðis at hálovaða fría kappingin í ávísan mun fær víðari rúmd á hesum økið.

Her eigur at vera og er rúm fyri okkum øllum, bert vit taka neyðugt fyrilit hvør fyri øðrum.

Komandi býráð eigur at seta sær nøkur mál, at gera upp hvat vilja vit við hesum býnum, viðvíkjandi vinnulívinum sjálvandi, men so sanniliga eisini hvussu vit skulu menna og styrkja okkara støðu á eitt nú: útbúgvingarøkinum, mentunarøkinum, sosialaøkinum, ítrottarøkinum og sosial-mentunarøkinum, bert fyri at nevna nøkur. Hetta, soleiðis at vit, um eini 5 til 10 ár, ung sum gomul øll kunnu siga, í Klaksvík – her er gott at búgva tað, vil Sjálvstýrisflokkurin.

VI‹MERKINGAR

Umstøður teirra eldru

Hallbjørg Hansen
Kambsdalur

Alternativir bústa›armøguleikar:

Fuglafjar›ar kommuna skal vera eitt sta›, har ta› er gott at búgva – eisini tá ein ver›ur gamal.

Fyri fólk, i› eru komin upp í árini eiga umstø›ur at ver›a skaptar fyri, at hesi - um tey ynskja ta› – kunnu hava a›rar bústa›armøguleikar. Ta› hevur ikki veri› si›venja í Føroyum higartil at flyta úr sínum egnu húsum, fyrr enn ein er noyddur til hetta av t.d. heilsuávum, men mugu vit tó ásanna, at ta› í framtí›ini ver›ur tørvur á, at útvega smærri bústa›ir, antin til leigu ella til keyps til borgarar, i› ikki longur orka at sita í sínum stóru húsum.

Havandi millum anna› hetta í huga er ætlanin at fara undir at kanna møguleikarnar fyri alternativari íbú›arbygging.

Samb‡lir:

Fyri tey, i› ikki longur klára seg sjálvi heima vi› hús, er kommunan farin í gongd. Naka› er gjørt á hesum økinum. Vit hava fingi› eitt eldrasamb‡li›, i› øll fegnast um. Serliga kunnu vit gle›ast um, at hetta liggur á einum øki›, har i› nógv lív er rundan um. Har kunnu tey gomlu eyglei›a børnini, i› spæla á dagstovninum.

Veruleikin er tó, at tørvurin fyri plássum er langt frá nøkta›ur enn. Hetta hevur í løtuni vi› sær, at ta› er bert ein partur av teimum, i› eru allar ringast fyri, i› higartil eru sloppin inn. Vit skuldu helst fingi› nøkur pláss aftrat næsta ár. Vit hava eisini ásanna, at øll gomul og veik hava ikki sama tørv, tí er ney›ugt at kanna a›rar møguleikar, t.d. at finna útvegir fyri at tey, sum eru dement, eisini kunnu fáa eina vir›iliga tilveru uttan at vera til ampa fyri onnur.

Røktarheim:

Samb‡lir eru upprunaliga ikki rokna› at ver›a røktarheim. Tí ver›ur framvegis ney›ugt at hava í huga útbyggingar á tí økinum. Hetta gerst ikki hjá einari kommunu einsamallari. Vit halda tó ikki, at ta› er rætt at blíva vi› at vaksa um verandi røktarheim í Eysturoynni, men at rættara loysnin heldur er at finna eitt anna› sta› at byggja á, og má ta› endiliga ikki ver›a á nøkrum útja›ara. Avgerandi er, at ta› liggur so høgligt sum gjørligt hjá teimum avvar›andi og ø›rum at koma til.

Fíggjarligu karmarnir:

Vit ásanna, at ta› er í nærumhvørvinum, tú best kanst fylgja vi› tørvinum hjá øllum borgarunum. Tá kommunurnar hava yvirtiki› alt eldraøki›, og harvi› eisini alla fíggjarligu ábyrgdina av hesum, skuldi bori› væl til at skipa so fyri, at peningur ver›ur settur av til at útbyggja hetta vi›.

Óskiljandi

Richard Danielsen,
Fuglafir›i

Øll vita vit og hava merkt, hvussu oljan, hetta sum okkum tørvar so nógv í okkara dagliga húsarhaldi, er farin upp í seinastuni, solei›is, at hon nú kostar so nógv, sum onganti› fyrr. Ja, vit hava hoyrt um, hvussu skipini ikki hava rá› til at gjalda hesa olju, tí hon er vor›in so ógvuliga d‡rur postur í tí dagliga rakstrinum, summi skip liggja tí ta› loysir seg ikki at fara út at fiska. Og tá gjalda skipini ikki avgjaldi›, og ta› er teimum væl unt.

Man ikki mangur vi› mær undrast yvir, at á hesa so d‡ru olju ver›ur áhaldandi lagt hetta stóra avgjald á húsarhaldini. Man skuldi trú, at ta› skuldi veri› øvugt, men so er ikki. Nei, ta› var solei›is herfyri at avgjaldi› minka›i, tá i› oljuprísurin hækka›i, men hetta broyttu okkara fólkavaldu menn, solei›is at nú ríkur prísurin uppeftir. Hvat hugsa hesir menn fyri sær. Ta› haldi eg ikki er ein órímiligur spurningur men heldur ógvuliga vi›komandi.